LM-047/2020

Fylgiskjal 5

Bára Michelsen

Fra: Teitur Samuelsen <tesa@estunlar.fo>
Sendt: 5. oktober 2020 17:40
Til: Fíggjarmálaráðið; Bára Michelsen
Cc: Uni Danielsen; Bjarni Askham Bjarnason; Annika Poulsen
Emne: VS: Til ummælis - Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu

Til FMR.

Vísandi til nevnda uppskot til løgtingslóg, hava fylgjandi viðmerkingar:

Í §11 b. stk 3 stendur: Atgongd til elektroniskar stakupplýsingar um navn bústað hjá eigarum og brúkarum av akførum og tøkniligar upplýsingar um akfarið, kunnu latast úr akfarsskránni hjá Akstovuni til hesi feløg og stovnar, sum krevja inn gjald fyri nýtslu av almennum tænastum, treytað av, at hvørt akfar sær frammanundan er eyðmerkt við at upplýsa nummarspjaldur:

1) P/F Tunnil vegna P/F Vágatunnilin, P/F Norðoyatunnilin og P/F Eystur- og Sandoyartunlar og
2) P/F Vága Floghavn

Tað er "vegna" sum okkum ikki dámar. Orsøkin er, at um P/F Tunnil verður strikað av einhvørjari orsøk, so heimilar lógin, um hon skal lesast stav fyri stav, ikki tunnilsfeløgunum hvør sær at fáa upplýsingar úr akfarskránni. Møguliga skuldi bara staðið: "almenn partafeløg sum krevja inn nýtslugjøld".

Í §11 b, stk. 9 Landsstýrismaðurin kann í kunngerð.....áseta gjald til Akstovuna fyri upplýsingar, sum verða latnar eftir stk. 3-7

Í viðmerkingunum á síðu 6 stendur at "gjaldið er eitt íbindingargjald, sum er í samsvari við kostnaðin av íbindingini, og eitt árligt gjald, sum er í samsvar við rakstur, loyvir og atgongd til skrásettar upplýsingar." Tað er í lagi at feløgini gjalda fyri tær útreiðslur Akstovan hevur, men vit eru ósamd í at hetta skal verða nýtt inntøkugrundarlag hjá Akstovuni, sum merkir at tunnilgjøldini mugu verða hægri enn annars neyðugt.

Vinarliga

Vegna tunnilsfeløgini
Teitur Samuelsen og Uni Danielsen